Munnliga prøvtøkan í kristni

Prøvhoyringin varir 20 minuttir, íroknað prøvdøming. Fyrireikingartíðin er 20 minuttir, íroknað útflýggjan av tilfari umframt leiðbeining.

Næmingurin tekur ein tilvildarligan spurning og fer í fyrireikingarhølið. Prøvhoyrt verður í kendum tilfari, 2-3 normalsíður í vavi, sum skal vera valt soleiðis, at tað í tema ella á annan hátt er knýtt at evnum, økjum o.til., sum arbeitt hevur verið við í undirvísingini.

Tilfarið, ið er grundarlag undir munnligu prøvtøkuni, skal í sínari heild síggja til, at øll faklig mál í lærugreinini eru umboðað.

Næmingurin skal við støði í fakligari tilgongd og støðisførleikunum sýna evni sjálvstøðugt at leggja fram og viðgera tilfar við støði í prøvtøkuspurningi/um.

Hann skal sýna, at hann dugir at taka fram týðandi tættir í tilfarinum, seta teir í samband við tættir í undirvísingini og síggja prøvtøkutilfarið í frásjón.

Givið verður eitt prøvtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki prøvtakarans.

Niðanfyri kunnu tit lesa lýsingina av teimum ymsu prøvtølunum.

Próvtal	Heiti	Lýsing
12	Framúr gott	Framløgan er greið, samanhangandi og væl skipað, og næmingurin vísir, at hann hevur gott innlit í tilfarið, sum próvtøkan er grundað á. Málið í framløguni er neyvt, tulkingin er sera væl grundað, við neyvum og greinandi eygleiðingum. Næmingurin brúkar trygt og sjálvstøðugt tey amboð, ið natúrliga eru knýtt at lærugreinini. Sjónarmiðini eru væl lýst og vísa gott innlit í lærugreinina. Fá og týdningarleys brek kunnu koma fyri.
7	Gott	Framløgan er samanhangandi og væl skipað. Málið í framløguni er skilligt og fjølbroytt. Tulkingin er góð, við greinandi eygleiðingum. Næmingurin brúkar tey amboð, ið natúrliga eru knýtt at lærugreinini, og er virkin í fakligu samrøðuni. Sjónarmiðini eru týðulig, og meting næmingsins av próvtilfarinum er væl grundað. Framsetingin er hóskandi skipað. Onkur brek koma fyri.
02	Nøktandi	Framløgan er heldur trilvandi og hongur ikki væl saman. Framløgan er so dánt væl skipað, skillig, men bæði fak- og málsliga veik. Greiningin er veik og tulkingin ógreið. og fakliga eygleiðingin veik. Næmingurin er við í fakligu samrøðuni, týðandi brek koma tó fyri.